## DAGSINS MEINING

# Land og kommunur

Stórar broytingar eru í ferð við at henda á kommunala økinum. Kommunur leggja saman, kommunur samstarva um ávísar uppgávur og kommunur átaka sær nýggjar uppgávur. Nógv áhugaverd initiativ koma frá kommunum ella kommunalum felagsskapum. Hitt mest kenda dømið man vera SEV, ið var eitt kommunalt initiativ, sum broytti allar Føroyar. Onnur dømi eru IRF og tunnilin undir Vestmannasundi, ið upprunaliga var eitt átak hjá felagskommuni í Vágum.

Eitt rák, ið alt meira hevur gjørt seg galdandi seinastu árini, snýr seg um at flyta uppgávur frá landi til kommunur. Fyri nøkrum árum síðan var tað umvent: tá vórðu kommunalar uppgávur fluttar frá kommunum til landsmyndugleikarnar. Eitt dømi um hetta rákið er, at nógvir kommunalir vegir gjørdust landsvegir. Men nú er rákið sum sagt hetta, at stórar og tungar uppgávur eru ella fara at verða fluttar frá landi til kommunur. Barnaansingin er flutt, og ásannast má, at henda flyting yvirhøvur hevur eydnast væl. Tað næsta, ið verður flutt, er eldraøkið, og so eigur skúlin tørn. Tað má ásannast, at virksemi, ið nemur við gerandisdag og lív borgarans eigur at vera so nær borgaranum sum møguligt. Í so máta kunnu góðar grundir vera til at flyta ábyrgd og fyrisiting frá landi til kommunur.

Men hesin politikkur krevur, at allar fortreytir eru í lagi. Hetta merkir, at talan má vera um uppgávur, ið egna seg til at leggja út, og at kommunurnar hava fíggjarliga orku og fyrisitingarliga at reka tær verða lagdar út. Hetta merkir so aftur, at landið eigur ikki at leggja uppgávur út bert fyri at spara landskassanum pening. Flyting av uppgávum frá landi til kommunur eigur bert at vera gjørd við tí fyri eyga at veita borgarunum betri tænastur. Landsmyndugleikarnir eiga tí at vera varnir í sínum politikki at flyta uppgávur, eins og kommunurnar eiga at vera varnar tá teimum verða álagdar nýggjar uppgávur. Hetta merkir so aftur, at landsmyndugleikarnir ikki eiga at smoyggja loysnir niður yvir kommunurnar. Heldur eiga landsmyndugleikarnir at samráðast við Kommunusamskipanina og Kommunufelagið um eina langtíðarætlan fyri tær útleggingar, sum talan kann verða um í framtíðini, soleiðis at kommunurnar altíð vita, hvar tær flóta.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

Yvirlýsing frá Føroya Náttúruverndarfelag

# Lítli Hólmur má friðast sum náttúruøki

**Nevndin**
*Føroya Náttúruverndarfelag 12. apríl 2003*



Vinnumálaráðið hevur biðið Landsverkfrøðingin at gera uppskot til hvar nýggja samferðsluhavnin á Trongisvágsfirði kann byggjast til nýggja Smyril. Verandi havnarlag á Drelnesi kann ikki brúkast tí, sum sagt verður frá, er ov nógvur súður fram við syðra partinum á fjørðinum og verður tí neyðugt at leggja grótkast út á fjørðin at verja atløgubryggjuna.

Sambært uppskotinum skal samferðsluhavnin byggjast upp at Lítla Hólmi og grótkastið leggjast yvir innara part av økinum har stóra grynnan stutt úr landið verður partur í uppfyllingini. Við uppskotinum verður í framtíðini ikki siglandi inn um hólmin.

Lítli Hólmur er serstakt náttúruøki inna á Trongisvágsfirði og einasti í landinum av sínum slag. Frá Gálganum eystaru megin er Birgishavn og Punthavn og síðan stóra víkin innan fyri Lítla Hólm við Krambatanga og velduga sevinum og tarðaskóginum kring hólmin. Tarðaskógurin niður á 4 metra dýpi er upp í 6 hektarar í vídd og tí vækstrarstað hjá hópin av smákyknum, fiskayngli, igulgerðum, øðum og øðrum skeljadjórum. Nógv æða og onnur fuglasløg halda til í økinum, ið allarhelst eisini er ónerva av dálking frá húsarhaldum, vinnuvirkjum og alingini á fjørðinum.

Alt strandaøkið frá Gálganum og væl vestur um Lítla Hólm er náttúruøki burturav og nógv brúkt sum útferðapláss har siglast kann við smábátum inn um hólmin. Óføra áhugavert er at hava snøri ella tráðu við sær tá reyðfiskur, seiður og flundra altíð kann fáast. Dýpið millum hólmin og Krambatanga er 3 til 6 metur og er í støðum ljósur sandbotnur og áhugavert at kaga á botn og síggja alt tað lív, ið har fer fram.

Á Krambatanga eru fornar leivdir har miðvíst mark ikki kann setast fyri víddini á økinum. Fornminnissavnið hevur staðfest økið som friðað øki, og kann tað tí tykjast í meira lagi, at Tvøroyrar kommuna í nýggja og broytta býarplaninum hevur lagt alt økið fram við hólmin og í mark til forna økið út til havn og ídnaðarøki. Økið hevur annars stórt hall og er rættulig ónýtiligt til t.d. ídnaðarbygging.

Nýggi býarplanurin leggur næstan 2 kilometrar av havnarøki út og kann tað við stóra havnarlagnum á

*Framhald á næstu síðu*

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Sosialurin prógvar, hvussu vánaliga fjølmiðlarnir arbeiða

**Áki Andreasen**



Vísandi til grein hjá undirritaða "Tá veruleikin ikki kann nýtast – skapa vit ein annan!!", vil eg enn eina ferð seta blaðstjóranum á Sosialinum nakrar spurningar; ikki tí - eg havi ikki fingið svar uppá hvussu tað bar til, at Sosialurin kundi skrivað eina yvirskrift um, at løgmaður ikki ger mismun á landsstýrisfólki. Tí í Sosialinum var Anfinn Kallsberg citeraður fyri at siga, at hann ikki hevði úttalað seg alment um Annlis Bjarkhamar fyrr enn hann fekk ein fyrispurning í løgtinginum. Men eg vísti á, at Sosialurin sjálvur hevði prógvini fyri, at hetta var ósatt, tí løgmaður hevði júst úttalað seg til Sosialin, áðrenn nakar fyrispurningur var í løgtinginum.

**Enn ein roynd at seta fram nakrar spurningar – svar ynskist!!!**
Sosialurin heldur fram mikudagin 9. apríl í somu rillu. Nú er tað ein blaðmaður hjá Sosialinum, Edvard Joensen, sum skrivar oddagreinina (sambært internetSosialinum), eg gjørdi nakrar ávegis viðmerkingar og staðfestingar av hvussu, leyst fjølmiðlar arbeiða og hvussu lætt verður farið um tað sum vanliga verður róptur "gott fjølmiðlaavrik" í fyrru grein míni, og fyri at koma – so eg vil spyrja:

- Hvussu ber tað til at Tjóðveldisflokkurin sjálvur hevur skyldina av persónsstríði tá m.a. Óli Breckmann dag um dag spillir Tjóðveldisflokkin, tjóðveldisfólk og enntá tey sum hava tilknýti til tjóðveldisfólk út við nógv verri orðum enn tey, sum Edvard Joensen tekur fram um løgtingsmann Tjóðveldisfloksins Torbjørn Jacobsen? Hevur Edvar Joensen nakrantíð sett sær spurningin, hvussu nógv persónsrok hevði verið, um tjóðveldispolitikarar reageraðu á sama hátt, uppá skipaðu útspillingina hjá Óla Breckmann, Dagblaðnum o.ø - sum løgmaður gjørdi í samband við greinina hjá Tórbjørn Jacobsen, Og hevur Edvard Joensen nakrantíð spurt seg sjálvan ella spurt løgmann, um tey so nógv umrøddu orðini hjá Torbjørn Jacobsen, vóru sonn?

- Sosialurin leggur síðani Annlis Bjarkhamar og Høgna Hoydal undir, at hava framt tað grovasta persónsálopið á nakran við at seta ein dana fram um ein føroying í starv. Sig mær, er Sosialurin beinleiðis rasistiskur? Ella veit Edvard Joensen, hvat er farið fram í hesum máli?

- Síðani sigur Edvard Joensen, at ein landsstýrismaður hevur blakað eina tíðindakvinnu á dyr. Og at sjónvarpsstjórin hevur noyðst at sent eina kæru til floksformannin. Sig mær, hevur Sosialurin yvirhøvur kannað, hvat er farið fram í hesum máli?

Enn einaferð sleppur ein undan at prógva, hvussu langt úti Sosialurin er. Tað megnar hann nógv betri sjálvur.

**Tjóðveldisflokkurin, yvirtøkurnar og fullveldisgongdin**
Síðani sigur Edvard Joensen, at Tjóðveldisflokkurin hevur ikki yvirtikið nakað mál, men tað hevur hinvegin Fólkaflokkurin.

Veit ein fulltíðarsettur tíðindamaður veruliga ikki betur? Ella lýgur hann soleiðis við vilja.

Tað var Høgni Hoydal, sum bæði gjørdi samtyktina um Sjálvstýri Føroya fólks og legði hana fyri tingið. Við henni varð gongd sett á yvirtøkurnar.

Tað var Høgni Hoydal, sum gjørdi og framdi ta stóru yvirtøkulógina, har skúlamál og almenna forsorgin vóru yvirtikin saman við eini røð av øðrum málum.

Tað var henda lógin, sum framdi niðurskurðin í blokkstuðlinum. Síðani hava aðrir landsstýrismenn tikið sær æruna av yvirtøkum, sum vóru gjørdar við hesari lógini. T.d. havumhvørvið og radiogrundaða neyð- og trygdartænastu, sum aðrir landsstýrismenn hava breggjað sær av.

Tá ein tíðindamaður kann føra so grovar lygnir og skeivleikar fram alment, so er tað besta prógvið um, hvussu vánaliga fjølmiðlarnir arbeiða.

Hetta er óhugnaligt, tá ein hugsar um, at fjølmiðlarnir skulu upplýsa fólk.

Eg vil hervið enn einaferð heita á Sosialin og í hesum føri bæði blaðstjóran og Edvard Joensen, um at rætta sínar lygnir.

# Mistak

Edvard Joensen hevur ikki skrivað oddagreinina í blaðnum 9. apríl, soleiðis sum Áki Andreassen leggur hann undir. Tað er eitt mistak, at Edvard Joensen hevur staðið sum høvundur av oddagrein í Internetsosialinum.

**Blaðstjórin**

# Skeiv mynd

Í blaðnum í gjár kom skeiv mynd at standa undir grein hjá Áka Andreassen á Argjum. Vit biðja Jan Áka Andreassen og høvundan sjálvan umbera okkum fyri hetta óhepna mistakið.

**Blaðstjórin**

# Rætting til Girokortini (Irak-hjálpin) hjá Reyða Kross Føroya

Av missgávum er telefonnummarið hjá Smylil Line og Skipafelag Føroya komin skeivt fyri í Girokortunum, ið borðin eru út til hvørt húski í Føroyum.

Smyril Line hevur telefon nummar 345900 og Skipafelag Føroya hevur telefon nummar 311225.

# Hvar eru kommunufeløgini?

**Finnleif Guttesen**



**Tíðin er komin, har Kommunusamskipan Føroyar og Føroya Kommunufelag mugu standa saman sum ein maður og siga við landsstýrið, at nú er tað nokk. Tí landsstýrið hevur við sínum tiltøkum víst, at tað leggur ein lort í kommunurnar**

Tað einasta sum landsstýrið skilur, er, at alt tos um útlegging til kommunurnar kann gloymast, til allar lógir um øktar útreiðslur og skerdar inntøkur hjá kommununum eru burturbeindar. Hetta er greið tala og kann ikki misskiljast, heldur ikki av landsstýrinum.

At kommunustýrislimir sita í samgonguni og góðtaka hetta, er heldur ikki skiljandi, tí kommunurnar kunnu ikki blíva við at átaka sær útreiðslur hjá landinum og góðtaka, at inntøkurnar blíva skerdar av landstýrinum.

Bert fríggjadagin 11. apríl 2003 vóru trý mál fyri á løgtinginum, sum áleggur kommununum útreiðslur við afturvirkandi kraft, hetta var:
- FAS-skatting
- Barnaansing
- Dagpengar til tímalønt

Og í næstum kemur uppskot um landskatt og kommunuskatt, sum skerja inntøkurnar hjá kommununum enn meira.

Omanfyri nevnda er einki eindømi hesi seinastu nógvu árini, og ongin kommuna ella nakað kommunufelag við virðing fyri sær sjálvum kann finna seg í hesum, og er tíðin tí komin, har kommunur og kummunufeløg siga við landstýrið, at nú er tað nokk.

At hetta skuldi verði gjørt fyri langari tíð síðani, er nakað heilt annað, men betri seint enn ongantíð.

*Framhald av síðu 10*

Tvøroyri sýnast í meira lagi, tá møguleikin fyri nýggjum havnarøki og bryggjukanti tá er nøktaður rættuliga nógv ár framyvir.

Friðingarnevndin fyri Suðuroyar Sýslu hevur viðmælt ætlaðu plasering av samferðsluhavnini og vísir í niðurstøðu síni einans til § 2.stk.2 nr. 1 í fyrsta parti í løgtingslóg um náturfriðing frá 9.juli 1970, har sagt verður, at innangarðs eigur ikki at verða bygt, uttan loyvi frá friðingarnevndini, undir bakkanum fra vallingini og omaneftir og á øki, ið eru upp til 100 metur frá bakkatromini, har eingin fjøra er frá meginsjóðarmálanum.

Annar partur viðger náttúrufriðing, ið friðingarnevndin einki ger við í niðurstøðu síni. Sambært hesum parti § 6 stk. 1, 2 og 3 kunnu friðingartiltøk setast í verk viðvíkjandi økum á landi, á vøtnum - og firðum - og áum, tá friðingin má haldast ynskilig av vísindaligum ella søguligum orsøkum. Eisini viðvíkjandi økum, ið bera av í vakurleika, hava sereyðkennir í landslagnum, plantigróður ella djóralívi, ið hava munandi týdning fyri fólk. Og afturat hesum fyri øki sum einsæris landsløg sum drangar, gjáir og gil, fossar, klettar, stórir steinar, áir, vøtn, trø og træhópar, - tá ið friðingin tykist ynskjandi í mun til vísindaligt ella søguligt virði, vakurleika ella sereyðkennir.

Føroya Náttúruverndarfelag hevur á aðalfundi 12. apríl viðgjørt ætlaðu plasering av samferðsluhavnini og vil harðliga mæla frá, at verkætlanin verður fram sum hon fyriliggur í løtuni. Sum er verður neyðugt at spreingja og dýpa havnarlagið, tá alt ov grunt er í innara parti í ferguplássinum. Allarhelst er orsøkin til ætlaðu plasering at avmarka nøgdina av gróti, ið leggjast skal út. Hólmurin sýnist sum partur av uppfyllingini, men er lítið ella heldur einki vunnið í kostnaðinum, tá spreingjast skal út í botnlendinum.

Vit vilja tí mæla til, at náttúruøkið við Lítla Hólm verður friðað og lagt út í býarplaninum sum frílendi til tryggjan av framtíðar møguleikum at njóta órørda náttúru og annars at tryggja eitt neyðugt livfrøðiligt margfaldni. Frástøðan til Drelnes og økisvíddin er ríkiliga stór til at samferðsluhavnin við fyrimunum kann flytast umleið 150 metur vestur so at rætta dýpið verður gagnnýtt og soleiðis at grótkastið heldur ger nýtslu av 10-12 metur grynnuni, ið liggur út fyri gomlu kirkjugarðsbrúnni. Tað sýnist ikki sum vegaíbindingin til landsveg er liðugt umhugsað. Hall er á landsvegastrekkinum og ein møgulig rundkoyring kann ikki fremjast uttan so at gamli kirkjugarðurin partvís verður tikin burtur.

Við hjáløgdu tekning verður heitt á Vinnumálaráðið og Tvøroyrar kommunu at bera so í bandi, at samferðsluhavnin verður flutt góðar 150 metur og Lítli Hólmur og økið kringum verður lagt út sum frílendi og náttúruøki burturav.